

## 12.000 arbeiðsleys

Í seinasta ársfjórðingi í fjør vóru í meðal 12.000 íslendingar arbeiðsleysir, og tað svarar til 6,7 prosent av teirri arbeiðsføru fjøldini. Hagtølini vísa, at arbeiðsloysið hjá monnunum var 7,9 prosent og og 5,4 prosent hjá kvinnunum. Harafturat vísa tølini, at arbeiðsloysið var størst ímillum tey 16 til 24 ára gomlu, har 16,1 prosent einki arbeiði høvdu. Í Reykjavík og har um vegir vóru 6,6 arbeiðsleys. Aðrsataðni í landinum var arbeiðsloysis-prosentið 7,0. Á hagtølunum sæst, at 1.700 av teimum, sum vóru arbeiðsleys í desember, høvdu verið arbeiðsleys í eitt ár ella meiri.

# »Heimsins bestu jarðarferðir« á Tjóðpallinum

**Deyðin er evnið í nýggjum leiki á Tjóðpallinum, sum talar til bæði børn og vaksin**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nýggi leikurin hjá Tjóðpallinum, ið hevur heitið »Heimsins bestu jarðarferðir«, er ein sera poetiskur leikur har vit øll, stór sum smá, kenna okkum aftur. Leikurin viðger deyðan á ein poetiskan og natúrligan hátt; deyðan, ið hugtekur og ræðir okkum øll, eisini børn.

Leikurin er fyrst og fremst ætlaður børnum frá 5 til 10 ára aldur, men talar eisini til størri børn og ikki minst vaksin.

### Fult av deyða

Hesin leikurin fæst óræddur við hetta evni, ið vaksin viðhvørt aftra seg við at viðgera saman við børnum.

Sum til dømis, tá gentan Ester sigur

"- Verðin er full av deyðum! - Millum runnarnar liggur ein deyður fuglur, ein firvaldur, ein mús. Onkur má verða fittur og taka sær av teimum. Onkur má taka seg saman og jarða øll hesu deyðu.

- Hvør? spurdi eg.

- Vit, segði hon.

Ester var altíð so djørv. Sjálvur ræddist eg bæði lívið og deyðan."

"Heimsins bestu jarðarferðir" er upprunaliga ein svenskur leikur fyri børn og vaksin, ið Volker Quandt hevur gjørt til leik eftir bókini Alla döda små djur eftir Ulf Nilsson og Evu Eriksson.

Laura Joensen hevur týtt, meðan Birita Mohr leikstjórnar. Leikarar eru tey bæði Barbara Christophersen og Bárður Persson. Katrin Bonde stendur fyri búnunum



*Tey bæði Bárður Persson og Barbara Christophersen hava høvuðsleiklutirnar í nýggja leikininum »Heimsins bestu jarðarferðin á Tjóðpalli Føroya*

Leikurin verður fyrst framførdur á Tjóðpalli Føroya frá 16. Januar 2010 og úteftir. Síðani verður farið at ferðast kring landið.

Atgongumerkir á fáast á Kunningarstovuni í Havn og við dyrnar 1 tíma undan sýning.

# Lestur uttanlands gevur dýrabæra barlast

**Í annaðkvøld verður kunnandi fundur í Miðlahúsinum, har eitt umboð fyri St. Norbert College fer at greiða frá amerikansku útbúgvingarskipanini**

UTTANLANDSLESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Miðlahúsið verður í annaðkvøld karmur um ein kunnandi fund, har Sam Dunlop frá St. Norbert College í Green Bay, Wisconsin, fer at greiða frá útbúgvingarskipanini í USA við útgangastøði í sínum egna universiteti.

Í tí sambandi verður eisini Leivur Reinert Djurhuus við á fundinum, og hansara uppgáva verður at svara spurningum um, hvussu tað er at ganga á hægri skúla í USA.

- Eg havi gingið trý semester á St. Norbert College nú, og tí kann eg greiða frá, hvussu tað hevur verið fyri meg at lesa uttanlands. Her er talan jú um eina heilt aðra mentan, sum er ógvuliga lærurík, sigur Leivur R. Djurhuus.

Hann heldur, at tað hevur stóran týdning, at føroyskur ungdómur velur at taka hægri útbúgving uttan fyri Føroyar.

- Eg haldi, at tað hevur nógv at siga, at vit føroyingar royna okkum av, ikki bert í nærumhvørvinum so sum Norðurlond mugu roknast at vera. Við at fara longur út í heim kemur tú í eina heilt aðra mentan, og tað er ógvuliga lærurík, sigur Leivur R. Djurhuus.

Sjálvur hevur hann upplivað tað sum eina ógvuliga spennandi tíð og eitt ógvuliga áhugavert umhvørvi á St. Norbert College.

Skúlin er rættiliga stórur, og har ganga 2.300 næmingar.

- Tað er eyðvitað stórur munur at koma frá einum føroyskum bygdarskúla til eitt slíkt college, men hjá mær hevur tað gingið sera væl. Eg eri limur í einum sonevndum »fraternity«, og vit gera nógv sjálvboðið, vælgerandi arbeiði, og tað kann so koma okkum tilgóða aftur, til dømis tá vit selja sodavatn á vøllinum hjá Green Bay Packers, sum er football-felagið í Green Bay, sigur Leivur R. Djurhuus.

Honum dámar sera væl serliga amerikanska fótbóltin, og á tann hátt sleppur hann ókeypis inn at síggja dystirnar.

Eitt annað, sum eisini verður sett í samband við amerikansk college, er ítróttur.

- Á skúlanum verður íðkaður alskyns ítróttur, og sum á øllum øðrum college's í USA verður gingið sera høgt upp í hetta, so tað eru ríkiligt av møguleikum, um áhugin er fyri ítrótti, sigur Leivur R. Djurhuus.

Fundurin um útbúgvingarmøguleikar umrøður eisini lesnað í Australia, Polen/Ungarn, Holland/Belgia og Aberdeen. Fundurin verður í Miðlahúsinum í annaðkvøld og byrjar klokkan 19.30.



*Leivur Reinert Djurhuus lesur á St. Norbert College í Green Bay, Wisconsin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*